# Lønin hjá Schmeichel trífaldað

Danski málmaðurin Kasper Schmeichel hevur fingið sítt veruliga gjøgnumbrot í Manchester City, og tað sæst beinanvegin aftur á lønarseðlanum hjá málmanninum. Ungi Schmeichel hevur sambært enska Daily Mail fingið ein betri sáttmála, og hann fær nú eina vikuløn á 50.000 krónur. Tað skal verða trífalt so nógv, sum hann hevur fingið higartil í ár.




# Amager mátti lúta

Í gjár tapti FC Amager fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum. Føroyska felagið í Keypmannahavn var á vitjan í Greve, og tað var heimaliðið, ið skoraði einasta málið í dystinum. Tað gjørdi Patrick Wibroe, tá ið 56 minuttir vóru spældir. FC Amager hevur fingið góða byrjan í 2. deild eystur, og fyrstu umførini gekk sum smurt. Nú hevur liðið bæði spælt javnleik og tapt, men er framvegis við í toppinum.

HB-B71 3-1 (1-0):

# HB klintrar víðari

**Tað var sjáldan, at sandoyingar gjørdu um seg í Gundadali. Og tá teir so hóttu eina løtu, fingu teir gulu reytt kort, og so var leiðin hjá HB púrasta opin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

*HB*

*B71*

Sandoyingarnir tóktust hava fingið í minsta lagið annað beinið skeivt úr seinginni sunnudagin.

Fyrsta partin av dystinum var vanliga væl skipaða B71 nevnliga als ikki til at kenna aftur. Miðvøllurin hekk slettis ikki saman, og tað gav HB óvanliga lætt spæl at spæla seg oman móti B71-málinum. At tað so ikki gav meira enn tað eina málið, sum Hans á Lag avrættaði inn um strikuna eftir bara fýra minuttum, komst meira av óneyvum HB-spæli heldur enn góðum verjuspæli. Tí veruleikin er, at fyrsti hálvi tímin í nógvar var átøkur innandura fótbólti, har menn spæla runt og runt um verjuna, áðrenn ein roynd verður gjørd at sparka í málið.

Í so máta mundi skjóta HB-leiðslan eisini órógva B71, sum við hesum fyri tað nógva misti møguleikan at spæla kvika kontraspælið, sum hevur eyðkent liðið. Og tað gjørdi tað ikki lættari, at HB hesa ferð hevði lisið uppá, soleiðis at teir dupult-kekkaðu Clayton Soares, mest sum hvørja ferð hesin fekk nakað at arbeiða við.

## Reytt til teir gulu

Fyri undirhaldisvirðið í dystinum gjørist fyrri hálvleikur tí ein størri oyðimarkargongd, men spenningurin vaks tó eftir steðgin.

B71 var nú raknað við, og teir byrjaðu eisini at skapa spentar støður móti HB-málinum. Næst við var Clayton Soares, tá hann sendi á stólpan, men løtu seinni mistu sandoyingarnir at kalla alt á gólvið.

Eirikur Poulsen var sjónliga ónøgdur um tað, sum var gingið fyri seg millum seg og HB-málverjan, og tá hann gjørdi Petur Reinert vart við hetta undir næsta HB-álopinum, tímdi Petur Reinert ikki meira. Næsta gula kortið til Jónsvein, og so mátti B71 spæla restin av dystinum við 10 monnum.

Og tað gav HB møguleikan at dusa sær. Jákup á Borg økti til 2-0, og saman við øðrum taldist hann millum stóru syndarnar, meðan gestirnir royndu at økja enn meira.

At sandoyingar samstundis royndu at trýsta niðaneftir gav HB bara enn betri møguleikar at kontra, og tá ein púrasta leysur Páll M. Joensen stútaði í netið til 3-0, reyk seinasti spenningurin. Clayton megnaði tó at minka um munin, tá hann varð feldur í brotsteiginum og sjálvur avgreiddi úr 11 metrum, men stórt meira enn tað sama gjørdist talan tó ikki um.



*Orð eru óneyðug. Jákup á Borg hevur økt til 2-0, og so kunnu sandoyingarnir iðra seg um, at dysturin at kalla er liðugur fyri teirra viðkomandi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fimm á rað

Fimti HB-sigurin á rað ber við sær, at meistararnir enn eina ferð minkaðu um munin fram til oddin. Hesin er nú tódnaður niður í seks stig, men enn vilja teir reyð/svørtu ikki hoyra talan um nakra endurtøku av søguni frá í fjør. Kanska ikki so løgið, tí fyrst og fremst, so eru seks stig nógv at skula vinna í eins nógvum dystum. Og hartil eigur HB eisini dyst á móti teimum trimum, sum kappast verður við í oddinum.

Hjá B71 er støðan hinvegin als ikki so hugalig, sum hon hevur verið tað. Úrtøkan síðani summarsteðgin hevur verið sera soltin, men tapið hjá AB fyri GÍ mundi tó koma væl við. Tað skal í øllum førum vilja heilt illa til, um sandoyingar skulu missa átta-stiga leiðsluna, sum teir hava niður til strikuna.

# Stjørnan tvey mál frá sigrinum

**Eftir greitt tap í fyrra dystinum var um reppið, at Stjørnan koppaði øllum á høvdið. Men við samlaðum 49-48 sigri gjørdist tað kortini Niksic úr Montenegro, sum spældi seg víðari í EHF-cup**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir seks mála tap í fyrra dystinum móti Niksic mundu tey flestu halda, at leikluturin hjá Stjørnunni í EHF var av.

Men tað var tó um reppið, at klaksvíkskvinnurnar tóku øll á bóli. Seinna dystin vann Stjørnan nevnliga við fimm málum, og vóru tær tí bert tvey mál frá víðari luttøku. Tvey mál, tí mál á útivølli telja meira, og tá Stjørnan á pappírinum hevði útidyst fyrra dagin, vildi ein 29-23 sigur í seinna dystinum ikki verið nóg mikið.

Sum skilst, so var tað ikki minst við góðum verjuspæli, at Stjørnan tók so dyggiliga til í seinna dystinum. Hetta gav møguleika fyri fleiri kontra-álopum, og tá hesi í flestu førunum góvu mál, gjørdist spenningurin øgiligur.

Tí var ónøgdin eisini stór, tá Una Olsen móti dystarenda fekk eina útvísing, sum væl hugsandi fekk avgerandi ávirkan á seinastu løtuna av dystinum.

- Tað var mest sum láturligt, sum dømingin var seinastu løtuna, og sjálvandi iðra vit okkum um, at vit ikki komu víðari. Men samanlagt haldi eg tó, at vit eru væl nøgdar. Vit skuldu bara ikki havt tapt so nógv í fyrra dystinum, tí við seks málum gjørdist munurin ov stórur, segði Una Olsen, tá vit mánamorgunin fingu orðið á hana.

Tá skuldi Stjørnu-hópurin undir drúgva ferð aftur til Føroya, og ikki fyrr enn seint í kvøld koma tær aftur til Føroya.

Um dystirnir sjálvar heldur Una annars, at hesir vóru sum dagur og nátt.

- Fyrra dystin spældu vit á ongan hátt upp til okkara besta. Eg veit ikki, um tað var langa ferðingin, nógvi hitin ella bara ov stór virðing fyri mótstøðuni. Men tað var bara ikki nóg gott. Til seinna dystin vistu vit sjálvandi betri, hvussu tær spældu, og so megnaðu vit eisini at lyfta okkara spæl. Vit høvdu at kalla ongar persónligar feilir, og vit skoraðu upp á teir uppløgdu møguleikarnar, og tað gjørdi munin. Og við eini stórari áskoðarafjøld, sum sjálvandi var ímóti okkum, gjørdist talan um eina ótrúliga uppliving. Men tíverri gjørdust vit altso akkurát ov stuttar.

- Og har er tað altso fyrst og fremst fyrra dystin, sum vit kunnu iðra okkum um. Høvdu vit bara tapt hendan við tveimum ella trimum málum, vildi støðan verið ein heilt onnur. Men tað fáa vit so ikki brúkt til nakað, og avrikið seinna dystin ger so kortini, at vit eru hampuliga væl nøgdar, heldur Una Olsen.

## FAKTA

**WHC Niksic – Stjørnan 26-20 (12-10)**
Simona Petersen 9, Joan M. Djordjevic 4, Anna Kristina Samson 3, Durita Christophersen 2, Hanna Mikkelsen 1, Vladina Midic 1

**Stjørnan – WHC Niksic 28-23 (14-11)**
Simona Petersen 12, Joan M. Djordjevic 6, Durita Christophersen 5, Vladina Midic 3, Lovisa Andreasen 3, Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 2